umhvørvisstovan

**Vegleiðing um brenning á báli og eldstaði**

Henda vegleiðing fyri bál eins og fyri eldstøð bæði uttan- og innandura er ætlað kommunum, feløgum og einstaklingum. Vegleiðingin er bert galdandi fyri virksemi, ið kommunur hava eftirlit við.

**Dømir um bál og uttandura eldstøð, ið henda vegleiðing er galdandi fyri:**

- steinsett bálpláss
- bálføt
- tunnur
- peisir
- jóansøku- og nýggjársbál o.l.

**Dømir um innandura eldstøð, ið henda vegleiðing er galdandi fyri**

- peisir
- grúgur
- ovnar
- ketlar o.l.

**Ikki er loyvt at brenna burturkast**[1]

Endamálið við einum báli ella eldstaði má ongantíð verða at sleppa sær av við burturkast. Burturkast skal ikki brennast, tí nógvur og eisini vandamikil roykur kann koma frá hesum. Alt burturkast skal latast góðkendum móttakara so sum IRF ella kommunalu brennistøðini hjá Tórshavnar kommunu.

**Loyvt er at brenna**

- pappír og papp
- óviðgjørdan og turran við so sum træplattar, trækassar og greinar
- kol
- torv
- koks o.l.

**Ikki er loyvt at brenna**

- Litað lýsingarbløð og annað blankt pappír
- Bildekk, gummi og plast
- Viðgjørdan við – dømi: trýstviðgjørdur, málaður og lakkeraður viður
- Spønplátur og træ við plastlaminati
- Innbúgv - sofur, madrassur
- Spillolju og annað vandamikið burturkast

---

[1] Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast

**Loyvi krevst til størri bál**
Loyvi krevst frá kommununi, tá talan er um stór uttandura bál, so sum nýggjárs- og jóansøkubál. Hetta er ikki galdandi fyri smærri bál og/ella eldstøð, tá endamálið t.d. er matgerð ella annar útihugni.

Er skrivligt loyvi givið frá kommununi og møguliga eisini sløkkiliðnum, eigur ábyrgdarpersónurin at hava loyvið hjá sær, soleiðis at tað, um biðið verður um tað, kann vísast avvarðandi myndugleika.

**Lítil bál**
- í mesta lagi 120 cm í diametur
- skulu vera í minsta lagi 10 metrar frá næsta húsi
- veðrið skal altíð vera til vildar, og verður frámælt at tendra bál um vindurin er yvir 10 m/s.

**Stór bál**
- størri enn 120 cm í diametur
- skulu vera í minsta lagi 30 metrar frá næsta húsi
- Veðrið skal altíð vera til vildar, og verður frámælt at tendra bál um vindin er yvir 15 m/s.
- Er bálið størri enn 3 metur í diametur og 2 metar høgt, eigur tað eisini góðkennast av sløkkiliðnum.
- Treytir, sum eru ásettar í loyvi frá kommununi, skulu lúkast.

**Má ikki vera til ampa**
Bál, stór sum smá, og eldstøð bæði innan- og uttandura mugu ikki elva til ampa. Um brenningin elvir til ampa, skal kommunan[2] ella politiið[3] geva boð um, at eldurin skal sløkkjast.

**Upprudding**
Leivdir frá báli skulu altíð takast upp, skjótast til ber. Fyriskipari av báli hevur ábyrgdina av at ruddað verður skjótast gjørligt aftan á, at bálið er sløknað. Leivdir frá báli skulu latast til kommunalu burturkastskipanina.

[2] §12, stk. 4. Í kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, við seinni broytingum
[3] §14 í politiviðtøkuni fyri Tórshavnar kommunu, og §4 í politiviðtøkuni fyri landkommunurnar